# Ólavsøkukórið til verka

**Fyrsta venjingin hjá ólavsøkukórinum verður sunnudagin 5. juli kl. 15-18. Sunnleif Rasmussen hevur komponerað ólavsøkukantatuna. Ólavur Hátún vónar, at kórið verður bæði gott og stórt í ár**

MENTAN

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fyrsta venjingin av nýggju ólavsøkukantatuni verður í Læraraskúlahøllini nú sunnudagin kl. 15-18. Sunnleif Rasmussen hevur komponerað ólavsøkukantatuna. Vegna kórsambandið vónar Ólavur Hátún, at kórið verður bæði gott og stórt í ár.

Í sambandi við at Tórshavnar Kommuna hevur 100 ár á baki sum fólkavald kommuna, hevur hon heitt á tónaskaldið Sunleif Rasmussen um at ger nýggja kantatu til Tórshavnar kommunu.

Á heimasíðuni hjá kommununi sigur Sunleif Rasmussen, at nú Havnin fyllir 100, hevði verið hóskandi við eini serstakari kantatu, sum gongur nýggjar tónlistarligar leiðir og samstundis tekur støði í tí bygda umhvørvi, sum er kring Vaglið og Tinghúsvøllin.

Hann lýsir nýskrivaðu kantatuna soleiðis:

- Ætlanin er at samnantvinna fortíð og nútíð í eina tónleikaframførslu, ella sjov, ið fevnir um kórsang, kingosang, kvøðing, messingblásarar, solosang, elgittar, percussion og elektrontónleik. Kór, solosangarar, elgittar, percussion og dirigentur standa á vøllinum. Kvæðabólkur dansar í býráðsgarðinum og kingosangarar standa og syngja millum Hafnia og Gamla Bókahandil. Tveir trombonleikarar standa á takinum á gamla Apotekinum, tvær trompetir blása úr báðum vindeygunum á Tinghúsloftinum og tvey horn úr vindeygunum á Býráðsloftinum. Samstundis streymar elektroniskur tónleikur úr seks sourroundhátalarum runt alt økið á Vaglinum.

Ólavsøkukantatan 2009 varir 20 minuttir og eftir hana heldur vanligi kórsangurin fram við sama kóri undir Tinghúsinum.



*Kantatan til Havnina er eitt tónleikasøguligt tiltak. Sunleif Rasmussen hevur gjørt tónleikin, og tekstin skrivaði Sólrun Michelsen, Oddfríður M. Rasmussen og Carl Jóhan Jensen*

## Leygarkvøldið verða Kaj Klein og Tóroddur Poulsen at hoyra á Tjóðpallinum

**Asfaltfyrireikararnir skriva, at vestminingurin Kaj Klein er komin til klettarnar at spæla Plastnoistløg á Asfalt. Framførðslan verður á Tjóðpallinum leygarkvøldið 4. juli kl. 22.30**



Her byrja teir at spæla Ost í Nato íme̲ðan multilistamaðurin Tóroddur Poulsen framførir yrkingar.

Síðan verða spæld Plastnoistløg, ið eru løg Kaj Klein hevur skrivað og arrangerað saman við bróður sínum Karl Anton Klein sála.

Hesuferð er manningin føroysk og eru teir íð spæla saman við Kaj Klein, Janus Kampmann Guitar, Eyðun Djurholm Trummur, Kristin Nolsøe Bech Bass, og Mattias Kampnak orgul. Manningin úr bólkinum Sic fara at syngja kór á tí vælumtókta lagnum Búrið.

Kaj Klein og bróðurin náddu at geva út tvær fløgur saman og eru tær Yppbaraøksl og 21.

Saman við Tóroddi Poulsen er trídupulta fløgan Úr Maskinrúminum, har Kaj Klein hevur skrivað tónleikin og Tóroddur Poulsen hevur skrivað meginpartin av tekstinum. Eisini hevur Kaj Klein sjálvur givið út fløguna Hálvt frá hálsi, ið er fløga við 60´ara og 70´ara føroyskum slagarum. Kaj Klein hevur eisini útgivið bandið Skot.


SUMMARFRÍ

Vit lata skrivstovuna aftur vegna summarfrí frá mánadegnum 20. juli 2009.

Opið verður aftur mánadagin 17. august 2009.

Øllum viðskiftafólki verður ynskt eitt gott summar.

menta
skrásettir grannskoðarar

J. Broncksgøta 16 · Tórshavn · Tel 310901 · menta@menta.fo · www.menta.fo

IKON // TEL 320 870



Sosialurin
Sosialurin
i





Hús í Sørvági til sølu

Vælhildin stór hús í tveimum hæddum, ovara hæddin køkur (nýggjur), stova, nýtt baðirúm, hjúnarkamar v/wc og brúsu, og 1 sovikamar, stór gongd v/trappu til kjallara har eru 3 kømur, stova, vaskirúm/fýrúm og hjallur, + eitt rúm í er klárt til at gerða baðirúm í.

Garasja við grovkøki er bygd føst í húsið, uml. 40 fermetrar.

Garður er stoyptur rundanum og túni omanfyri er alt flisabelagt.

Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvið á blindvegi.

Búvídd er uml. 240 fermetrar. Grundøkið 750 fermetrar. Byggiár 1985

**Ringi og hoyri nærri á tlf. 210452 eftir kl 17.**



BALLUPRESSUR

FÁIÐ SLÁTTURIN SKJÓTT OG VÆL FRÁ HONDINI



Plast av allar hægstu dygd og net serframleitt til okkara pressur

- Betri fóður
- Skjótari liðugt
- Lætt at handfara

Triv

Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo



SLÁIMASKINUR

IÐ SLÁA ALT

- 2+2 gear ella 6+2 gear (báðar vegir)
- Prísir frá kr. 16.350 til 31.000



Knívar í ymiskum støddum frá 71 til 148 cm

Triv

Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo